# Eg vil ongantíð



Guðrun Sólja trívist væl í Keypmannhavn

**- Í tvey ár á rað havi eg sagt nei takk til danska melodi grand prixið. Eg avgjørdi eftir seinnu finaluna í Stjerne For En Aften, at hetta vildi eg ongantíð aftur uppliva, sigur Guðrun Sólja Jacobsen, ið vit hava hitt á Amager har hon býr. Vit prátað um Stjerne For En Aften, tíðina í Keypmannahavn og um hvar leiðin nú gongur fyri føroyska sangfuglin.**

**SAMRØÐA**
**Orð:** Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo
**Myndir:** Símun Jóannesarson

Nógv er broytt síðan Guðrun Sólja Jacobsen fyri 4 árum síðan flutti til Danmarkar. Stjerne For En Aften vinnarin hevði plátusáttmála, ferðaðist frá konsertstaði til konsertstað í limosinu. Eftir tvær útgávur á tveimum ymiskum plátufeløgum eru limosinurnar býttar um við bussar og metro, plátusáttmálin er býttur um við starv sum reingerðarfólk á skurðdeildini á sjúkrahúsinum í Gentofte. Men enn er eftirspurningur eftir Guðrið, og meðan vit sita og práta, ringir telefonin. Onkur vil hava hana at syngja til eitt brúdleyp.

## Hevur nógv á skránni

– Eg havi nógv at gera í summar. Nú hevur annars verið nokkso stilt eina tíð, men kalendarin er nokkso fullur í summar, greiður Guðrun frá. Hon spælir nógv til veitslur og tílíkt serliga saman við gittarleikara sínum Henrik Nielsen, men eisini onkuntíð við klaveri og saksofon afturat teimum.

Fyrsta tiltakið á skránni er leygarkvøldið, tá Guðrun og Showmenn fara á pall saman í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

– Eg eri nokkso nervøs, hugsi kemur nakar? Hvør kemur? Fara tey at dáma tað? Eg havi spælt saman við Showmonnum einaferð fyrr, tað var á Summar Festivalinum. Tað var forbiðið feitt, sigur Guðrun, ið eisini gleðir seg til at sleppa á pall í Føroyum aftur.

Guðrun hevur gjørt tvær fløgur, tann fyrra hevði hampulig sølutøl og var givin út sum vinningur fyri Stjerne For En Aften, meðan tann seinna við bert lániløgum var minnið væl eydnað.

## Í ekstasu í eitt hálvt ár

Men hvussu minnist Guðrun aftur á tíðina fyri fýra árum síðan, tá hon vann Stjerne For En Aften?

– Eg minnist, tá eg sendi inn til kappingina, eg var so spent. Eg spældi eitt lag hjá Celine Dion inn, og sendi tað inn í síðstu løtu, greiður Guðrun frá.

– Eg fekk longu í august boð um, at eg skuldi til casting í januar, so í eitt